## Rosenborg missir stuðulsspælara




Daniel Braaten er eitt heitt navn í norskum fótbólti. Álopsspælarin, sum hevur skotið nógv mál fyri Rosenborg, sigst nú at verða á veg til enskan fótbólt. Fleiri feløg í Premier League eru áhugað í álopsspælaranum, og tað verður roknað fyri vist, at Braaten í heyst fer til Onglands at spæla. Sáttmála hjá Braaten við Rosenborg gongur út eftir kappingina í ár. Fulham, Aston Villa, Everton og serliga Bolton hava víst Braaten áhuga.

## Uppflytarar stíla høgt

Genoa skal næsta kappingarár aftur spæla í bestu italsku fótbóltsdeildini, og felagið ætlar veruliga at gera nakað fyri at halda plássið í Seriu A, har felagið ikki hevur verið við seinastu 12 árini. Genoa ætlar at styrkja liðið við fleiri spælarum, og tað verður sagt, at forsetin hevur sett 110 milliónir krónur av til at keypa nýggjar spælarar fyri til næsta kappingarár. Genoa hevur keypt ein spælara, men ætlar sær at fáa tríggjar spælarar afturat á liðið.

# Altjóða íløga skal brúkast ímóti AB

**Hóast KÍ leygardagin datt burtur úr Intertoto kappingini, so var avrikið so mikið, at tað gevur klaksvíkingum mót undan lyklauppgerðini ímóti argjamonnum**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar vóru útferð í Eysturoy í góðveðrinum leygardagin. Eftir at hava verið vitni til steypasigurin hjá kvinnunum fór fjøldin úr Leirvík og út á Svangaskarð.

KÍ tapti 2-1 ímóti Hamarby, sum harvið heldur fram í kappingini við málmuninum 3-1.

Uppleggið hjá Eyðuni Klakstein var tað sama, sum tað var í Stokhólm næstsíðsta leygardag. KÍ liðið var aftarlaga í útgangsstøðuni. Tað bar við sær, at Hamarby skuldi nýta hugflog fyri at spæla seg ígjøgnum tøttu KÍ verjuna og royna úti frá við langskotum.

Hamarby hevði bóltin nógv tann størsta partin av tíðini. Skotroyndirnar úti frá vóru so at siga ongar. Teir fingu hol á, tá ið KÍ spælari var so óheppin við fótinum at stýra innleggi í málið aftanfyri Meinhard Joensen, sum saman við miðverjanum Jan Andreasen vísti altjóða støði.

Eftir at Kaj Ennigarð hevði javnað, vóru áskoðararnir mælskari, enn teir higartil í ár hava verið kring vøllin í Klaksvík. KÍ hevði fleiri hornaspørk, og tað var eftir eitt av hesum og út frá, at Kaj stýrdi bóltin í málið, eftir at høgri vongverjin Høgni Madsen hevði roynt seg við skoti útifrá.

### KÍ var nær við

Sigursmálið skoraði Hamarby við brotsparki. Ein av fáum ferðum varð bólturin spældur inn um KÍ verjuna, og Kaj Ennigarð var so mikið óheppin, at hann skumpaði ein av mótstøðumonnunum um koll.

Síðstu løtuna flutti KÍ fólkið longri fram. Paul Clapson, sum hevði verið rættiliga einsamallur á toppinum, og innskifti Erling Fles høvdu góðar royndir, men Hamarby málverjin, sum er gamla svenska landsliðsmálverjan Ronnie Hellström, bjargaði meistarliga.




Hóast tapið, so fóru klaksvíkingar av Svangaskarði við vón um, at avrikið kann brúkast sum grundarlag undir fyrireikingunum til lykladystin í botninum í Formula deildini. Hesin dysturin verður mikukvøldið, tá ið AB fer at vitja í Klaksvík.

**FAKTA**

Intertoto, 1. umfar, seinni dystur

KÍ-Hammarby 1-2 (0-1)
0-1: Sjálvmál
1-1: Kaj Ennigarð
1-2: Paulinho, brts.
KÍ: Meinhard Joensen – Høgni Madsen, Jan Andreasen, Kaj Ennigarð, Harley Bertholdsen (Erling Fles, 70.) – Gunnar Nielsen, Kristian á Lakjuni (John Hammer, 75.), Kristoffur Jacobsen (Leon Bjartalíð, 80.), Símun Joensen, Heðin á Lakjuni – Paul Clapson

Hammarby vann samanlagt 3-1

## 1. deild

*Útsettur dystur*
**HB-ÍF 1-3 (1-0)**
**1-0:** Tróndur Sigurðsson
**1-1:** Amin Fallah Sadeh
**1-2:** Høgni Zachariasen
**1-3:** Elvan Taser

**15. umfar**

**B68-HB 4-0 (0-0)**
**1-0:** Dánial Hansen 52.
**2-0:** Dánial Hansen 65.
**3-0:** Dánial Hansen 73.
4-0: Alexandro Casthilio 89.

**ÍF-TB 4-1 (3-0)**
**1-0:** Høgni Zachariasen 14.
**2-0:** Frank Poulsen 17.
**3-0:** Nenad Saric 45.
**3-1:** Jón Tórður Holm br 67.
**4-1:** Nenad Saric 76.
**Reytt kort:** Frank Poulsen, ÍF, 67. (2 gul)

**KÍ-B36 1-6 (0-3)**
**0-1:** Tummas Hans Rubeksen 10.
**0-2:** Ovi Nysted br 17.
**0-3:** Jóhan Ellingsgaard 24.
**1-3:** Álvur Christiansen 55.
**1-4:** Jóhan Ellingsgaard 65.
**1-5:** Tummas Hans Rubeksen 76.
**1-6:** Tummas Hans Rubeksen 82.

**NSÍ-FSV04 1-1 (0-0)**
**1-0:** Klæmint A. Olsen 73.
**1-1:** Hans Arni Ellefsen 77.

**SÍ-LÍF 2-3 (2-1)**
**1-0:** Haukur Thorsteinsson 7.
**1-1:** Andreas Lava Olsen 33.
**2-1:** Hegga Samuelsen 38.
**2-2:** Bárður á Lakjuni 55.
**2-3:** Sølvi Vatnhamar 85.
**Reytt kort:** Høgni Ole-Jacobsen, SÍ, 63.

# Atli og Ovi venja við KÍ

**Í fleiri feløgum verður arbeitt við at fáa nýggjar spælarar, nú flytingarvindeygað er opið**

NÝGGIR SPÆLARAR
*Jóannes Hansen*

Flytingarvindeygað er framvegis opið, og í fleiri feløgum verður arbeitt við at fáa nýtt fólk.

Í síðstu viku vórðu fleiri nýggir spælarar skrásettir í AB, og tá flutti Súni Fríði Barbá úr AB og til FSV04. Hann var á liðnum, sum spældi 1-1 í Runavík.

Andrew av Fløtum flutti sunnudagin úr Fremad Amager og til HB. Andrew var ikki við, tá ið HB var partur av málleysum javnleiki í Vági. Annað mikukvøld skal HB aftur til Vágs. Tá verður seinna hálvfinalan í steypakappingini á skránni, og tá verður Andrew av Fløtum við í HB ferðalagnum.

Í NSÍ verður arbeitt við at finna nýggjan álopsspælara. Har verður ikki hildið, at Andersson hevur megnað tað, sum roknað varð við.

Í Klaksvík verður eisini leitað eftir fólki. Í fyrsta umfari eru teir ikki farnir so langt. Tá ið KÍ vandi seinnapartin sunnudagin, vóru Atli Danielsen og Ovi Nysted millum spælararnar. Atli er komin heim í summarfrí frá Frem, har hann hevur verið fastur maður á miðvøllinum. Ovi hevur higartil í ár spælt við B36. Leygardagin var hann á næstbesta liðnum, sum smurdi KÍ av.

Sum tað skilst, so er ætlanin í Klaksvík, at loyvi hjá Atla skal fáast til Klaksvíkar, so hann verður við ímóti AB mikukvøldið. Ovi hevur ikki vant við B36 seinastu vikurnar. Um spæliloyvið hjá honum verður flutt til Klaksvíkar valdast, hvussu tingini fara at ganga upp.

Í B36 eru teir ógvuliga áhugaðir at fáa fatur á toppskjúttanum hjá KÍ Paul Clapson. Men í Klaksvík hava teir verið avgjørdir um, at toppskjúttin er ikki til sølu.